# Grand-Prix og FM

**Um vikuskiftið varð endaspælið í Grand-Prix kappingini leikt í Badmintonhøllini, eins og FM-kapping fyri unglingar stóð á skránni**

BADMINTON
*Jákup Mørk*

Kappast varð í tveir dagar. Leygardagin var tala num Grand-Prix fyri unglingar og vaksin, og her eydnaðist Aksel Poulsen úr HBF at vinna manskappingina. Hjá kvinnunum varð tað ikki óvæntað Guri Poulsen, sum gjørdist vinnarin.

Sunnudagin var so FM-kappingin í einsmansleiki í A-bólkinum og fyri unglingar á skránni.

**Úrslit**

**Grand-Prix, endasplið**
**Kvinnuunglingar**
1 Óluva Bærentsen ÍF
2 Nicola Gram MBF
3 Ulla í Dávastovu VÍF

**Kvinnur**
1 Guri Poulsen HBF
2 Guðrun Poulsen VÍF
3 Marit Mortensen HBF

**Menn**
1 Aksel Poulsen HBF
2 Erland Poulsen HBF
3 Niclas Eysturoy HBF

**FM fyri unglingar og A-bólkin**
Mansunglingar
1 Niclas Eysturoy HBF
2 Rógvi Poulsen HBF

**Kvinnuunglingar**
1 Ulla í Dávastovu VÍF
2 Nicola Gram MBF

**A-bólkurin**
1 Ulla í Dávastovu VÌF
2 Brynhild D. Carlsson HBF

# Liðkapping í amboðsfimleiki

**Leygardagin skal besta amboðsliðið í landinum finnast, tá FM-kapping er á skránni í Runavík**

FIMLEIKUR
*tíðindaskriv*

Leygardagin tann 16.apríl 2005 verður árliga FM kappingin í amboðsfimleiki fyri lið. Kappingin verður hildin í Ítróttarhøllini í Runavík, og byrja verður kl. 13.00.

Kappingin er býtt í tvey, soleiðis at tey yngru kappast fyrst og tey eldru seinni um dagin. Frá kl. 13.00 til umleið kl. 16.00 verður kappast í teimum yngru bólkunum, bólki 1 og 2, og frá kl. 17.00 til umleið kl. 20.00 verður kappast í teimum eldru bólkunum, bólki 3 og 4.

Tey luttakandi feløgini eru: Støkk, Ljósið og Havnar Fimleikafelag.

Støkk luttekur við einum dreingjaliði og 5 gentuliðum, Ljósið luttekur við trimum gentuliðum og Havnar Fimleikafelag luttekur við 3 dreingjaliðum og 4 gentuliðum.



*Umframt at vera FM-kapping, er talan eisini um eina fyribils vegleiðing um, hvørjir fimleikarar hava møguleika at sleppa á Oyl-liðið*

**Oyggjaleikir í eygsjón**

Kappast verður ikki bert um FM heitið fyri lið. Hendan kappingin verður eisini brúkt sum ein fyribils vegleiðing til, hvørjir fimleikarar ið hava møguleika at koma við til Oyggjaleikirnir komandi summar. Ein bruttohópur verður úttikin til vikuskifti 22-24. apríl, tá ið landsliðsvenjarin Henrik Bertelsen kemur til Føroya, at hava eina felagsvenjing í Havn.

# Skúlatalvkapping í Vestmanna

**Vestmanna Skúli og skúlarnir í sandoynni skipaðu seinasta vikuskifti fyri talvkapping**

TALV
*Jón Mikkelsen*

Mogens Nielsen hevur nú í nakrar mánaðir havt regluliga skúlatelving á Sandoynni.

Telva verðu 4 dagar um vikuna, og skiftur ímillum 3 tær størstu bygdirnar á oynni.

Higartil hevur undirtøkan verið sera góð, og hava eina staðni millum 50 og 70 børn verið til regluligu telvingarnar.



Sunnudagin 10 apríl skipaði Vestmanna Talvfelag og skúlatelvingini á Sandoynni fyri einum stórum talvtiltakið í Vestmanna.

Saman vóru komin 68 børn, 54 av Sandoynni og 14 úr Vestmanna, øll 11 ár og yngri.

Telvað bleiv í einum stórum bólki og vóru 5 umfør telvaði. Eftir kappingina var hugni við døgurða og onkrum góðum omaná.

**12 virðislønir vórðu lætnar og vóru vinnaranrir hesi:**

**Fyri Vestmanna:**
• Jóhan Vørmadal
5 stig Gull
• Jógvan Emil Joensen
4 stig Silvur
• Bárður Jónsson Stórá
4 stig Bronsa

**Fyri Skálavík:**
• Grímur Jacobsen
5 stig Gull
• Brandur H. Olsen
3 stig Silvur
• Maria Dalsgarð 3 stig Bronsa

**Fyri Sands bygd:**
• Sverri Dalsgarð 4 stig Gull
• Aron Clementsen 3,5 stig Silvur
• Martha T. Hentze 3 stig Bronsa

**Fyri Skopun:**
• Pætur Poulsen 4,5 stig Gull
• Karl Fríði Vestergaard 4 stig Silvur
• Heini Winther 4 stig Bronsa

# FM í borðtennis

**FM fyri yngru leikararnar í borðtennis var í Ítróttarhøllini í Trongisvági um vikuskifti**

BORÐTENNIS
*tíðindaskriv*

Áleið 100 leikarar vóru møttir, at kappaðst um 7 FM heitir. Byrjað var kl. 9 sunnumorgun og hildið var áfram til langt út á kvøldið. Kappast var í ein- og tvímansleiki, hjá bæði gentum og dreingjum. Hartil varð eisini kappast í blandaðum tvímansleiki.

FM fyri eldru deildirnar verður komandi leygardag í Gundadalshøllini í Tórshavn.

**Úrslitini í Trongisvági vóru hesi:**

**Smápinkur - Einmansleikur:**
1 Anna Mikkjalsdóttir TBF
2 Súsanna Bærentsen TBF
3 Sofía Maria Ferjá TBF

**Tvímansleikur:**
1 Sofía Maria Ferjá og Eva Vilhelm TBF
2 D. Jensen og A. Mikkjaldóttir TBF
3 Súsanna Bærendsen TBF

**Smápiltar- Einmansleikur:**
1 Patrik Johannesen TBF
2 Hans Jón Jacobsen TBF
3 Eyðfinnur Jensen TBF

**Tvímansleikur:**
1 Hans Jón Jacobsen og Eyðfinnur Jensen TBF
2 Patrik Johannesen og Dávid Mortensen TBF

**Pinkur - Einmansleikur:**
1 Rakul Mikkjalsdóttur TBF
2 Ránnva í Heiðunum TBF
3 Marin Sofía Brattalíð TBF

**Tvímansleikur :**
1 Rakul Mikkjalsdóttur og Rannvá í Heiðunum TBF
2 Marin Sofía Brattalíð og Femja Mortensen TBF
3 Anna Mikkjalsdóttur og Birita Mortensen TBF

**Piltar - Einmansleikur:**
1 Teitur Justinussen TBF
2 Jákup Thomasen TBF
3 Jónhard Ferjá TBF

**Tvímansleikur:**
1 Jákup Thomasen og Teitur Justinussen TBF
2 Ragnar Joensen og Páll Heri Nolsøe TBF
3 Jónhard Ferjá og Rógvi Joensen TBF

**Smágentur - Einmansleikur:**
1 Susie Midjord TBF
2 Rakul Mikkjalsdóttur TBF
3 Sheila Strøm TBF

**Tvímansleikur:**
1 Sheila Strøm og Joan Thomasen TBF
2 Susie Midjord og Rakul Mikkjalsdóttur TBF
3 Svanna Mortensen og Rannvá Joensen TBF

**Smádreingir - Einmansleikur:**
1 Reidar Luid Tór
2 Rói Agnarsson Tór
3 Fróði Jensen TBF

**Tvímansleikur:**
1 Reidar Luid og Rói Agnarsson Tór
2 Jákup Thomasen og Teitur Justinussen TBF
3 Fróði Jensen og Gilli Sørensen TBF

**Blandaður tvímansleikur**
1 Sjúrður Ferjá og Sheila Strøm TBF
2 Hugin Albinus og Susie Midjord TBF
3 Jákup Thomasen og Joan Thomasen TBF